**Býráðsfundur mánadagin 24. september 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Steintór Jacobsen, Tollak Joensen, Fríðgerð Heinesen, og Jan E. Petersen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.45 var ikki við í viðgerðini av málunum nr .1,2 og 3

**Fundurin lokin kl. 00.45**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **12/00307**<br>**Umsókn um byggiloyvi til uppíbyggingar í verandi seyðahús á matr. nr. 65a í Norðragøtu**<br>Umsókn frá festara Líggjas Hansen um uppíbygging til verandi seyðahús.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at geva byggiloyvi til amboðshús og til sláturhús sambært hjálagda tilmælið frá teknisku umsiting. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.<br><br>Umsóknin um fíggjarligan stuðul til stuðlamúr/vegg verður ikki gingin á møti. |
| **2.** | **12/00294**<br>**Umsókn at keypa stykkið frá Eysturkommunu - part av matr. nr. 36 í Syðrugøtu**<br>Umsókn frá Petur Martin Johannesen um loyvi at keypa uml. 20 $m^2$ av matr. nr. 36 í Syðrugøtu, stykkið liggur móti vegnum og inn móti garðinum til Valhøll.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at økið ikki verður selt, grunda á, at økið er ein partur av einari størri verkætlan og liggur sum fornminni (K). Tekniska nevnd mælir eisini til at kommunan hampar um øki skjótast møguligt.<br><br>Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini. |
| **3.** | **12/00162**<br>**Garður og stakitt um Tyrluhúsið í Norðragøtu**<br>Málið var fyri í teknisku nevnd, fíggjarnevndini og býráðnum í apríl í ár. Býráðið samtykti at endurskoða uppskoti. Tekniska umsiting hevur endurskoða uppskotið.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at fremja broytingaruppskotið í inniverandi árið. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |

**Býráðsfundur mánadagin 24. september 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Steintór Jacobsen, Tollak Joensen, Fríðgerð Heinesen, og Jan E. Petersen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.45 var ikki við í viðgerðini av málunum nr .1,2 og 3

**Fundurin lokin kl. 00.45**

Fíggjarnevndin mælir til at arbeiða víðari við málinum, í sambandi við býarskipanina.

**4. 12/00309**
**Hølisviðurskiftini hjá frítíðaransingini.**
Steintór Jacobsen hevur uppskot um at halda fram við ætlanini at út- og umbyggja hølini á Gásamýri (mál nr. 12/00175), og at sleppa ætlanini at byggja hølir til frítíðaransingina við við skúlan.

Málið útsett til komandi býráðsfund.

**5. 12/00284**
**Uppskot um at avtaka foreldragjald**
Borgarstjórin hevur uppskot um at avtaka foreldragjaldið í Eysturkommunu.

Fíggjarnevndin mælir til at leggja málið fyri býráðið.

Málið tikið av skrá.

**6. 12/00282**
**2.viðgerð av eykajáttan til konto 5.24.14.510-10 (Stuðul til mentan)**
Á býráðsfundi tann 27 august 2012, bleiv samtykt at veita eykajáttan á 50.000,00 kr. til konto 5.24.14.510-10 **(Stuðul til mentan)**. Peningurin verður tikin av konto 3.26.11.510-10 **(Barnagarðar)**

Eingin broyting er frá 1. viðgerð

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**7. 12/00285**
**2.viðgerð av eykajáttan til konto 6.30.41.511 (Kloakkir)**
Á býráðsfundi tann 27. august 2012 bleiv samtykt at til at veita eykajáttan á kr. 500.000,00 kr. Peningurin verður tikin av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð.

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**Býráðsfundur mánadagin 24. september 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Steintór Jacobsen, Tollak Joensen, Fríðgerð Heinesen, og Jan E. Petersen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.45 var ikki við í viðgerðini av málunum nr .1,2 og 3

**Fundurin lokin kl. 00.45**

**8.** **12/00308**

**1.viðgerð av eykajáttan til bátahylin á Toftanesi**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan á kr. 3.800.000,00. Sum er óbrúkt játtan frá 2011.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

**9.** **12/00075**

**Býarplanur og byggisamtykt fyri Eysturkommunu**

Einmælt samtykt at taka undir við at leggja fyriliggjandi uppskoti til býarplan og byggisamtykt fram til almenna hoyring.

**10.** **12/00286**

**Støðutakan til gamla GÍ-húsið**
Víkingur hevur sent kommununi bræv har sagt verður frá, at tað er samtykt á aðalfundi at felagið ynskir at kommunan yvirtekur gamla Gí-húsið, og at Víkingur fær nýtslurætt til nýggja húsið.

Samtykt at Eysturkommuna yvirtekur gamla GÍ-húsið, og at umsitingin saman við Víkingi ger uppskot til avtalu millum Víking og Eysturkommunu um nýtslurætt og viðlíkahald v.m fyri nýggja húsið. Avtalan skal leggjast fyri býráðið til góðkenningar.

**Atkvøður fyri:**
Jóahn Christiansen
Fríðgerð Heinesen
Hanna Jensen
Páll Isholm
Hans Mourits Foldbo
Terji Lervig
Jan E. Petersen
Tollakur Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Steintór Jacobsen

**11.** **12/00076**

**Lutaíbúðirnar í Leirvík**

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at halda fast við uppruna uppskoti, við smærri tillagingum.

**Býráðsfundur mánadagin 24. september 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Steintór Jacobsen, Tollak Joensen, Fríðgerð Heinesen, og Jan E. Petersen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.45 var ikki við í viðgerðini av málunum nr .1,2 og 3

**Fundurin lokin kl. 00.45**

**12.** **12/00279**
**Graslíki rundanum vøllin í Sarpugerði**
Eysturkommuna hevur fingið uppskot/tilboð um graslíki at leggja á rundanum vøllin í Sarpugerði. Kostnaðurin er 247.000,00 kr.

Fíggjarnevndin mælir til at leggja málið fyri býráðið til støðutakan.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka av fyriliggjandi tilboði.

Peningurin verður tikin av konto 5.24.62.511 Ítróttaranlegg (løgujáttan)

**13.** **12/00311**
**Skifta klædning, huðrar og vindeygu í Gøtu skúla**
Støðutakan til innkomin tilboð.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka av lægsta tilboðnum á kr. 311.600,00 uttan mvg sum er frá Sp/f MTM

Peningurin veður tikin av konto 4.23.22.511 Fólkaskúlin (løgujáttan).

**14.** **12/00295**
**1. viðgerð av fíggjarætlan 2013**
Sambært grein 39 í kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 17. september at leggja fyriliggjandi uppskot við einum avlopi aftaná rentir og avdrátt á kr. 85.460,00 fyri býráðið.

Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ________________________________________

Fríðgerð Heinesen ________________________________________

Jan E. Petersen ________________________________________

Hanna Jensen ________________________________________

## Býráðsfundur mánadagin 24. september 2012 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Terji Lervig, Páll Isholm, Hans Mourits Foldbo, Steintór Jacobsen, Tollak Joensen, Fríðgerð Heinesen, og Jan E. Petersen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.45 var ikki við í viðgerðini av málunum nr .1,2 og 3

## Fundurin lokin kl. 00.45

Páll Isholm ____________________________________________

Hans Mourits Foldbo ____________________________________________

Terji Lervig ____________________________________________

Tollakur Joensen ____________________________________________

Steintór Jacobsen ____________________________________________